## Útstykkja í Gásadali



Tað eina grundstykki er longu selt, meðan fyrispurningur er til hini trý, nú tey í Gásadali eru farin undir at stykkja út til fýra nýggj grundstykkir. Talan er um avbygdarfólk og fólk, sum hava tilknýti til Gásadal. Borgarstjórin í Sørvágs kommunu, Jákup Suni Lauritsen, sigur seg vóna, at talan er um sethús og ikki summarhús.
– Tað merkir nógv fyri Gásadal, at tey fáa fólk hartil, soleiðis at bygdin kann broytast. Fáa vit nakrar barnafamiljur til Gásadals, so hevur tú eina heilt aðra støðu. Har búgva eini 15 eldri fólk í Gásadali, meðan tey sum hava fingið byggiloyvi eru ein barnafamilja, sigur Jákup Suni Lauritsen við Dimmalætting.

## Strongdar kvinnur

Ingrid Stage, forkvinna fyri DM – fakfelagið hjá teimum vællærdu í Danmark., sigur, at tvístøðan millum arbeiðslív og familjulív er ofta meira stressandi fyri kvinnur enn hon er fyri menn, og vísir til eina kanning, sum Socialforskningsinstituttet frá 2005. Sokallaða flex-tíðin á arbeiðsmarknaðinum hevur sambært somu kanning positiva ávirkan mannfólk og teirra strongd, meðan hetta ikki er galdandi fyri kvinnur. Ingrid Stage sigur, at samstundis sum hetta er galdandi, so brúka konufólk í miðal ein tíma meiri upp á húsligt arbeiði enn mannfólk. Tí metir hon, at vera arbeiði úti og heima lagt saman hjá kvinnum og monnum, so er talið hægri hjá konufólkum, og hetta kann vera tyngjandi fyri tær.

# Infrakervið útbyggjast munandi

**Arbeiðsbólkurin, ið hevur viðgjørt grundarsteinin Infrakervi, mælir til, at umfatandi útbyggingar verða gjørdar bæði í vegir, tunlar og ferjur**

VISJÓN 2015
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Visjón 2015 er førd út í lívið, skal tað í mesta lagi taka tveir og ein hálvan tíma at koma til Havnar úr fjarasta staði í landinum.

Her verður sjálvandi hugsað um Suðuroynna og tað merkir, at úr Sumba til Havnar skal ferðatíðin ikki verða meiri enn hálvantriðja tíma.

Tá verður roknað við tunli millum Streymoynna og Sandoynna og ferðasambandi av Sandi til Hvalbiar.

Úr øðrum støðum í landinum skal í mesta lagi nýtast hálvurannnar tími til ferðing til Havnar, har landafast ikki er, og har vegasamband er allan vegin, skal ferðatíðin ikki fara upp um ein tíma.

Hartil ásetur arbeiðsbólkurin, at ferðatíðin til umráðandi virksemi, sum tað verður nevnt, tað er handlar, læknahjálp og postavgreiðslu, skal í mesta lagi vera hálvan tíma. Sama er galdandi fyri ferðatíðina millum Havnina og flogvøllin.

Aftrat hesum verður mælt til at gera ein hóp av íløgum í vegir, tunlar og ferjur. Fyri vegakervið verður mælt til fylgjandi.

Tiltøk og tíðarfreistir:

| | |
|---|---|
| Hovstunnil | 2007 |
| Vegur um Leirvík | 2008 |
| Tryggja vegirnar til Tjørnuvíkar og Dals móti omanlopi | 2008 |
| Innkomuvegir til Havnar | 2010 |
| Aðrar ábøtur, t.d. vegakervið í Kalsoynni og brúgvin um Streymin | 2010 |
| Vegur um Skálabotn | 2012 |
| Tunnil norður um Fjall | 2012 |
| Sandoyartunnil | 2014 |
| Eysturoyartunnil | 2014 |
| Tunnil millum Skálafjørðin og Gøtudal/Kambsdal | 2014 |
| Hvalbiartunnil | 2015 |

### Framkomuleiki og smidleiki

Í viðmerkingunum til hetta verður sagt, at í 2006 var ferðatíðin til Havnar, har landfast var, ein tími, tó undantikið ávís øki og bygdir í Eysturoynni og bygdirnar norðan fyri Klaksvíkina. Men tá Eysturoyartunnilin er komin, verða eisini hesi støð komin upp í hendan fjarleika.

Men tað verður eisini neyðugt at gera annan atkomuveg til Havnar, um ikki orkuføristrupulleikar (kapacitets-) við bíðitíð skulu verða kring høvuðsstaðin. Hesin vegur skal gera tað lættari at koma til Havnar og føra ferðsluna uttan um og inn í býin á skilagóðan hátt.

Á Borðoynni er trupulleikin tann, at stór akfør ikki sleppa gjøgnum tunlarnar, og tí mugu hesir útbyggjast ella nýggir gerast. Eisini skal ferðatíðin úr Suðuroynni skerast niður í hálvantriðja tíma, og letur hetta seg gera, tá Hovstunnilin er gjørdur, nýggjur Hvalbiartunnil komin, tá siglandi er millum Hvalba og Sandoynna og tá koyrandi er av Sandi til Havnar.

Somuleiðis verður neyðugt við ábøtum á vegirnar til Tjørnuvíkar og Dals soleiðis, at hesir verða tryggjaðir móti omanlopi, eins og brúgvin um Streymin krevur ábøtur.

»Rakstur, viðlíkahald og vetrarhald skulu skipast soleiðis, at flytføri, framkomuleiki og smidleiki eru av tí besta«, verður sagt í frágreiðingini.

### Sjey nýggj skip

Fyri sjóleiðirnar mælir bólkurin til, at ikki færri enn sjey nýggjar ferjur verða bygdar komandi sjey árini. Fyri hesi síggja »Tiltøk og tíðarfreist« soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Farmaskip | 2011 |
| Nólsoyarskip | 2008 |
| Svínoyar/Fugloyarskip | 2008 |
| Skúvoyarskip | 2009 |
| Kalsoyarskip | 2010 |
| Mykinesskip | 2013 |
| Hest/Koltursskip | 2014 |

Hartil skulu fleiri havnir tillagast nýggju skipunum. Tann tíðarfreistin sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Havnatillaging til nýggj skip | 2011 |
| Havn í Svínoy | 2012 |
| Havn í Skúvoy | 2013 |
| Havn á Sandi | 2014 |
| Havn í Hvalba | 2015 |

Tá hugsað verður um fólkaflutning metir arbeiðsbólkurin, at mest umráðandi er, at hædd verður tikin fyri ferðatíð, ferðadygd, smidleika og at flutningstólini eisini eru egnað til fólk við niðursettum førleika. Mælt verður til at útvega skjóttgangandi skip – tað er minst 22 knob – á farleiðunum til Nólsoyar, Skúvoyar, Mykinesar, Svínoyar og Fugloyar og út í Hest og Koltur.

Hartil eiga nýggj skip at kunna sigla í minst líka ringum veðri sum verandi skip. Eisini verður mælt til, at eitt serligt farmaskip verður útvegað til farmaflutning til nevndu oyggjar.

Eydnast alt hetta at fremja í verki innan ár 2015, má sigast, at Føroyar fara at hava eitt vælútbygt infrakervi, og at útjaðarin í mestan mun er tikin við í framtíðarætlanir fyri landið.



*Mælt verður til at byggja ikki færri enn sjey nýggj strandfaraskip komandi sjey árini*